## Súni steðgaði FCM

FC Midtjylland hevur verið í stórformi higartil í ár, og teir hava bjóðaða av í oddastríðnum. Í gjár megnaðu teir ikki at vinna ímóti botnliðnum Viborg, sum hevði Súna Olsen á vøllinum allar 90 minuttirnar. FC Midtjylland kom – sum væntað – á odda, men góðar 10 minuttir fyri tíð javnaði innskifti Muomaife fyri Viborg. Súni og teir liggja framvegis til niðurflyting – í løtuni 8 stig aftanfyri AGF á triðaftasta plássi.



## Balling skoraði

Ulrik Balling, sum hevur verið burtur við skaða, var aftur millum málskjúttarnar, tá ið Vejle vann stórsigur í næstbestu donsku fótbóltsdeildini í gjár. Vejle spældi á heimavølli ímóti Ølstykke og vann 5-1. Ulrik Balling, sum eitt hálvt ár spældi fyri NSÍ, skoraði eitt av málunum hjá Vejle, sum hevur beina kós í superliguna. Vejle er 11 stig frammanfyri nummar 2 í donsku 1. deild.

# Bjørn bergtók í judo

**Bjørn Andreasen úr Sunda Judofelag vann tvær av teimum stóru finalunum, sum vóru í badmintonhøllini leygardagin**

JUDO
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*



*Talan var um nógvar og harðar dystir, tá føroyameistararnir í judo skuldu finnast leygardagin*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

### Menn undir 80 kg

Hjá monnum undir 80 kg. kappaðust Hjalmar Johannesen úr Sunda Judofelag og Bjarki Poulsen úr Havnar Judofelag um bronsuna. Hjalmar er av royndastu judomonnum í Føroyum, meðan Bjarki hinvegin er ein av teimum nýggjaru, so her var munur á, og Hjalmar vann eisini dystin uttan stórvegis trupulleikar.

Hinvegin gjørdist finalan millum Áka Davidsen úr Havnar Judofelag og Jógvan Páll Kristiansen úr Sunda Judofelag eitt sak brak av einum dysti. Teir vóru sera javnir, og allir teir 4 minuttirnir, ið eru avsettir til ein judodyst gingu, uttan at tað eydnaðist nøkrum teirra at skora nakað stig. Ikki tí, báðir royndu sítt ítarsta alla tíðina, men teir vóru so javnir, at hvørgin fekk skora nakað móti hinum.

Tá so avsetta tíðin var farin, so verður farið undir næsta dyst, ið er eftir goldenscore prinsippinum, t.v.s. at dysturin gongur til annar teirra hevur skorað eitt stig. Eisini hesin dysturin gongur allar 4 minuttirnar, til tað at enda eydnast Áka at kasta Jógvan Páll við einum kasti, ið gevur Yoku, t.v.s. 5 stig, men hetta er nóg mikið til, at Áki vinnur gull í hesum vektbólkinum.

### Menn yvir 80 kg

Hjá monnum yvir 80 kg. høvdu Bjørn Andreasen og Edvard Johannesen, báðir úr Sunda Judofelag, kvalifisera seg til finaluna, men Edvard var so óheppin í kvalifikatiónsdysti til opnan bólk at gerast skaddur, so hann fekk ikki kappast í finaluni, sum Bjørn harvið vann uttan dyst.

### Unglingar

Hjá unglingum høvdu teir báðir Nicolai Mohr Vang og Jógvan Martin Davidsen, báðir úr Havnar Judofelag, vunnið sær luttøku í finaluni. Hetta gjørdist eisini ein sera javnur dystur, har tað tó eydnaðist Nicolai miðskeiðis í dystinum at vinna sær Yoku fyri eitt kast, og eftir sum eingin skoring kom afturat í dystinum, gjørdist hetta nóg mikið at vinna dystin og harvið gullmedaljuna.

### Menn opin bólkur

Hjá monnum í opnum bólki stíddust Hjalmar Johannesen og Jógvan Páll Kristiansen úr Sunda Judofelag um bronsuna. Hesir báðir kenna hvønn annan sera væl, og hetta gjørdist ein sera javnur dystur. Teir høvdu møtst áður í innleiðandi umfarinum í kappingini undir 80 kg., og tá vann Jógvan Páll, men hesa ferð lá Hjalmar omaná og vann bronsuna.

Finaludysturin var ímillum 18 ára gamla Bjørn Andreasen úr Sunda Judofelag og Áka Davidsen úr Havnar Judofelag. Hetta var eisini ein javnur dystur, har báðir royndu ymiskt at fáa felt hin, men at enda í dystinum eydnaðist tað Bjørn at fáa syft Áka og skora Ippon, sum merkir, at dysturin er vunnin.

Samanumtikið ein spennandi kapping, sum livdi væl upp til spenningin, ið eisini var í hinum kappingunum í borðtennis og badminton hendan dagin.

### Endaliga støðan í FM gjørdist:

**Kvinnur**
**Einmansleikur:**
1. Guri Poulsen, HBF
2. Brynhild Carlsson, HBF
3. Rannvá Carlsson, HBF

**Tvímansleikur:**
1. Guri Poulsen og Guðrun Lamhauge, HBF
2. Brynhild Carlsson og Rannvá Carlsson, HBF

**Menn**
**Einmansleikur:**
1. Niclas Eysuroy, HBF
2. Aksel Poulsen, HBF
3. Rógvi Poulsen, HBF

**Tvímansleikur:**
1. Aksel Poulsen og Bjartur Lamhauge, HBF
2. Gunnar Poulsen og Fríði Lamhauge, HBF

**Blandaður tvímansleikur:**
1. Guri Poulsen og Niclas Eysturoy, HBF
2. Rannvá Carlsson og Tobias Effersøe, HBF

**Ársins kvinnuligileikari:**
Guri Poulsen, HBF

**Ársins mannligileikari:**
Aksel Poulsen, HBF

**Ársins stjørnuskot:**
Rannvá D. Carlsson, HBF

# ameistarar

fekk 2. sett, men hesaferð dró Brynhild frá í endanum og vann sær settið. Í 3. og avgerandi setti kom rutinan hjá Guri til góðar, og hon hevði ikki stórvegis trupulleikar við at vinna tað, dystin og harvið føroyameistaraheitið. Brynhild tyktist sera troytt í avgerandi settinum, og framdi alt ov nógv mistøk. Brynhild er tó framvegis ung, og vit fara uttan iva at síggja nógv til hennara í framtíðini.



*Guri Poulsen varð trýst av Brynhild Carlsson í finaluni, men tá avgerandi bóltarnir skuldu sláast, vigaðu royndirnar hjá Guri mest*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

### Endaliga støðan í FM gjørdist:

**Unglingar**
1. Nicolai Mohr Vang, HJF
2. Jógvan Martin Davidsen, HJF
3. Búgvi Hansen, SJF

**Menn undir 80 kg**
1. Áki Davidsen, HJF
2. Jógvan Páll Kristiansen, SJF
3. Hjálmar Johannesen, SJF

**Menn yvir 80 kg**
1. Bjørn Andreasen, SJF
2. Edvard Johannesen, SJF
3. Jákup Jensen, HJF

**Menn Opin Bólkur**
1. Bjørn Andreasen, SJF
2. Áki Davidsen, HJF
3. Hjálmar Johannesen, SJF

**Fighter steypið**
Pætur Jákupsson, HJF

**Ársins herðaklapp**
Jan Günther, HBF og Johannes Johannesen, SJF